## Hanus í Sólarmagn

Lagt er upp til intima tónleikaupplivíng, tá Hanus G. Johansen leygarkvøldið 22. november spælir konsert í Sólarmagn á Velbastað. Við plássi fyri 50 áskoðarum er Sólarmagn millum minstu konserthøli í landinum, og kemur lurtarin tí heilt tætt at einum av føroysku mentunardýrgripunum. Sólarmagn liggur í vakrari náttúru við útsýni yvir Kolturssund. Konsertin leygarkvøldið verður tann fyrsta í eini røð av intimkonsertum við fólkakærum tónleikarum í Sólarmagn. Næsta konsertin verður við einum av Velbastað og Eivør Pálsdóttir vitjar í januar. Dyrnar lata upp klokkan 19.00 og atgongumerki fáast á Kunningarstovuni í Havn fyri 165 krónur.



## Slutt við fríari heimatelefon

Eisini landsstýrisfólk mugu halda seg til skattareglurnar. Í ársfrágreiðingini frá landsgrannskoðanini verður víst á, at landsstýrismaðurin í innlendismálum fram til 2007 hevði fría heimatelefon. Eftir at grannskoðanin hevði gjørt var við hetta, tosaði Innlendismálaráðið við TAKS, og har vóru boðini, at landsstýrismenn ikki hava seravtalu fram um aðrar borgarar í landinum. Ráðið sigur seg hava tikið boðini til eftirtektar, og koma landsstýrismenn ikki at hava fría heimatelefon í framtíðini.

# Mín løn er ov lág




*Stjórin á Samvit, Elin Heinesen, heldur seg fáa ov lága løn. Hon metir ikki, at lønin hjá henni samsvarar við arbeiðsbyrðuna*

**Elin B. Heinesen, stjóri á Samvit, er ónøgd við lønina hon fær, tí hon helt, at hon fór at vera einum hægri lønarflokki. Elin Heinesen vinnur 39.215,79 krónur um mánaðin, men kundi hugsað sær 43.467,68 í staðin**

LØNARVIÐURSKIFTI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stjórin í Samvit er ónøgd við lønina hjá sær. Hetta stendur í ársfrágreiðingini frá Landsgrannskoðanini. Har stendur eisini, at Vinnumálaráðið hevur sent henni setanarsáttmála at skriva undir, men at hon ikki hevur gjørt hetta. Sambært Vinnumálaráðnum stóð greitt í starvslýsingini, at starvið var flokkað í 37. lønarflokki, og ikki í 38. sum hon ynskir.

- Eg var stødd niðri í Danmark, tá eg søkti starvið. Eg sá ongantíð starvslýsingina, men eg fekk eitt skriv, har tað stóð, at eg fekk løn í 38. lønarflokki. Eg gjørdist satt at siga bilsin, tá eg fekk fyrstu lønina, tí eg helt, eg átti at fáa meira. Tað kann tó væl vera, at tað á onkran hátt er mín egna skuld, at eg ikki havi kannað viðurskiftini betur, sigur Elin Heinesen. Sum er ónøgd við, at hon fær knappar 40.000 krónur um mánaðin heldur enn góðar 43.000 krónur um mánaðin.

### Farin niður í løn

Elin Heinesen var í einum starvi í Danmark, og er, sambært henni sjálvari, farin niður í løn við at koma til Føroyar at arbeiða.

- Eg fekk eina løn, ið svarar umleið til 38. Lønarflokk í Danmark. Tí eri eg hørm um, at lønin er farin niður. Eg visti ikki betri, enn at eg fekk umleið somu løn sum í gamla starvinum, sigur Elin Heinesen. Hon leggur afturat, at tað er ein misskiljing, ið er hend, men hon metir ikki, at lønin er nøktandi, í mun til arbeiði og ábyrgd.

### Sum ein arbeiðari

Í stóran mun er Elin Heinesen sera fegin um starvið hjá sær, men hon metir ikki, at hon fær eina hóskandi løn, ið svara til arbeiðsbyrðuna.

- Hevði mann hugt at tímalønini, og hvussu nógvar tímar eg arbeiði, hevði mann sæð, at eg neyvan vinni meiri pening enn ein vanligur arbeiðari, og tað meti eg ikki vera hóskandi. Tí kundi eg hugsað mær meiri løn, og eg hevði eisini eitt spennandi starv í Danmark, greiðir Elin Heinesen frá, og leggur afturat, at hon hevði umhugsað støðuna nógv, um hon visti, at hon kom heim til eina løn, sum er minni enn hon fekk í fyrrverandi starvinum.

### Ivast um hon fær meira

Arbeiðsgevari hennara hevur ikki givið úttrykk fyri, at ætlanin er at geva henni meira løn, og tí ivast hon eisini í sjálv.

- Eg havi ikki ánilsi fyri, um eg fari at fáa meira løn. Eg meti meg bara fáa ov lítið av løn í mun til arbeiðið, og tað veit arbeiðsgevarin eisini av, at eg haldi, sigur Elin Heinesen.

# Lønin verður ikki broytt

**Snorri Fjallsbak, stjóri á lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum, metir ikki, at Elin Heinesen fær ov lága løn. – Øll ynskja sær hægri løn, og Elin Heinesen fær longu knappar 40.000 um mánaðin. Sostatt rokni eg ikki við, hon skal vænta sær meira, ger Snorri Fjallsbak greitt**



*Snorri Fjallsbak, stjóri á lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum, metir á ongan hátt, at Elin Heinesen fær órímiliga løn, tí sambært honum, fær hon løn, sum aðrir stjórar í líknandi størvum*

LØNARVIÐURSKIFTI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stjórin á Lønardeildini metir, at Elin Heinesen fær nokk av løn, tí starvið varð lýst at skula vera í 37. lønarflokki, og tað er lønin hon fær.

- Hatta starvið er flokkað á sama hátt sum onnur størv, og vit halda, at tað eigur at vera í hasum lønarflokkinum. Vit kunnu ikki gera við, hvat hon hevur fingið at vita, tí í starvslýsingini stóð greitt, at hon fær løn í 37. lønarflokki, vísir Snorri Fjallsbak á. Sum leggur afturat, at allir stjórar ynskja sær at vera í 38. lønarflokki, men at tað bara eru heilt fáir tungir stjórar í hesum bólki.

### Ikki órímiliga illa fyri

Snorri Fjallsbak metir heldur ikki, at hon á nakran hátt fær lítla løn.

- Í 37. lønarflokki fáa fólk 39.215,79 krónur um mánaðin, og afturat tí 15 prosent í eftirløn, so eg meti á ongan hátt, at hon er órímiliga illa fyri, sigur Snorri Fjallsbak. Hann leggur afturat, at tað má standa fyri hennara egnu orð, um hon metir seg fáa somu løn sum ein vanligur arbeiðari, tí so skal hon arbeiða 80 tímar um vikuna, tí ein vanligur arbeiðari fær helvtina av lønini hon fær.